FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Postboks 208
110 Tórshavn

Stjórnarskrivstovan
11. mars 2020
Mál: 20/00149-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 62/2019

Svar til § 52a fyrispurning nr. 62/2019 frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni

Fyrispurningur um prísin á útróðrarfiski, settur landsstýrismanninum í fiskivinnumálum Jacobi Vestergaard (at svara skrivliga eftir TS §52 a)

Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera nakað fyri at betra um góðskuna á útróðrarfiski, soleiðis at útróðrarbátar fáa besta prísin?

Svar:
Spurningurin snýr seg um góðsku á útróðrarfiski, so hesin kann fáa besta prís. Í viðmerkingunum verður víst til, at hagreiðing er avgerandi.

Viðurskifti viðvíkjandi góðsku á útróðrarfiski eru fevnd av matvørulóggávuni (løgtingslóg nr. 58 frá 26. mai 2010 um matvørur v.m.) og kunngerð nr. 161 frá 18. desember 1995 um heilsufrøðiligan rakstur, viðgerð av fiski og fiskaúrdrátti og løggilding av fiskiførum.

Nevnda lóg og kunngerð eru undir málsræði hjá landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum.

Spurningurin um góðsku á útróðrarfiski eigur tí at verða settur landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum.

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður

Ministry of Fisheries

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo